# Oljan skal koma øllum til góðar

**– Vónirnar til oljuleiting við Føroyar hava verið ov bjartskygdar. Kortini haldi eg, at oljuleiting og virksemi í kjalarvørrinumá henni eru vorðin ein náttúrligur partur av bæði handilslívinum og lívinum hjá manninum á gøtuni. Tað er vorðið til ein náttúrligan áhuga og vónir. Avbjóðingin verður sjálvandi, hvussu vit megna at stýra okkara vónum, tá eitt oljufund er gjørt segði Bjarni Djurholm, tá hann mánadagin handaði loyvini í 2. útbjóðing**

## 2. ÚTBJÓÐING

*Jan Müller*

Tað var landsstýrismaðurin i oljumálum, Bjarni Djurholm, sum fekk heiðurin at lata altjóða oljufeløgum loyvini at leita eftir olju og gassi á føroyska landgrunninum undir eini samkomu á Hotel Føroyum mánadagin. Latin vórðu sjey loyvi til átta oljufeløg.

Bjarni Djurholm legði fyri við at minna á, at tað eru júst fýra ár síðani, at skjøtil varð settur á eina nýggja tíð fyri føroyskan handil og ídnað, nevniliga tá sjey leitiloyvi í fyrstu útbjóðingini á føroyskum øki gjørdist veruleiki.

– Nú verður tosað um eitt nýt stig, eitt nú lop. Endamálið við at lata upp fyri enn eini útbjóðing hevur verið at skapa eitt støði fyri framhaldandi leitivirksemi á føroyska landgrunninum við tí endamáli at finna lønandi oljukeldur í undirgrundini.

Við arbeiðsskráunum, sum eru samtyktar fyri tey sjey loyvini haldi eg vit hava rokkið okkara endamáli. Hóat ongir brunnar eru við í hesum loyvunum í fyrstu atløgu, so er ætlanin at menna økið. Seinni skulu loyvishavararnir gera av, um teir vilja bora brunnar, og tann avgerðin fer vónandi at hava við sær at funnin verða lønandi oljufund.



*Bjarni Djurholm, landsstýrismaður handaði oljufeløgunum tey sjey loyvini*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Bjarni Djurholm vísti á, at tað tíverri ikki hevði verið gjørligt at liva upp til øll ynskini um níggju loyvini, einsvæl og feløgini í einstøkum førum hava søkt um somu teigar.

Hann segði annars, at loyvini, sum verða latin, eru í samljóð við tær reglur og treytir, sum Oljufyrisitingin hevur sett út í kortið og sum galdandi lóg fyrisetur.

Landsstýrismaðurin helt fram og segði, at síðani løgtingið í 1993 samtykti eina kolvetnislóg fyri føroyska landgrunnin hevur verið gjørt av, at virksemi í sambandi við leiting skal verða í Føroyum.

Og eins og við tí fyrstu runduni, so er ásett oljufeløgunum, at tey vísa vilja til at samstarva við føroyingar og føroyska handilsvinnu. Endamálið við hesum samstarvi millum tey og tann lokala ídnaðin, er at halda fram við at menna føroyska ídnað. Umframt at kunna fáa ágóðan av hesum, so fer okkara handilslív eisini at eggja til nýggjar avbjóðingar.

Bjarni Djurholm legði aftrat, at samskiftið millum føroyskar myndugleikar og oljufeløgini hevur verið sera gott. – Tað er mín vón, at hetta góða samstarv fer at halda fram í framtíðini.

– Eg havi sagt tað fleiri ferðir, at vónirnar til oljuleiting við Føroyar hava verið ov bjartskygdar. Kortini haldi eg, at oljuleitingin og virksemi í kjalarvørrinum á henni eru vorðin ein náttúrligur partur av bæði handilslívinum og hjá manninum á gøtuni. Tað er vorðið til ein náttúrligan part av áhuga og vónum. Avbjóðingin verður sjálvandi, hvussu vit megna at stýra okkara vónum, tá eitt oljufund er gjørt. Kortini eri eg sannførdur um, at saman kunnu vit tryggja, at ein framtíðar oljuframleiðsla fer at koma øllum samfelagnum til góða, oljufeløgunum og øllum øðrum pørtum.

Eg fari at brúka hetta høvið til at takka tykkum og ynskja tykkum tillukku við loyvunum og eg fari at ynskja teimum nýggju oljufeløgunum vælkomnum til Føroyar.



*Nógv kend andlit vórðu at síggja stóru løtuna á Hotel Føroyum, tá oljuloyvini vórðu latin feløgum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Úrslitið av 2. útbjóðing

**Loyvini, ið eru latin, eru hesi**

Loyvi nr. 008
ChevronTexaco 40%
Statoil 30%
Dong 20%
OMV 10%
Føroya Kolvetni 10%

Loyvi nr. 009
Statoil 50%
Shell 20%
Dong 20%

Loyvi nr. 010
Statoil 100%

Loyvi nr. 011
Statoil 100%

Loyvi nr. 012
Føroya Kolvetni 100%

Loyvi nr. 013
Geysir 60%
Atlantic Petroleum 40%

Loyvi nr. 014
Geysir 60%
Atlantic Petroleum 40%

VETRARÚTSØLA



GALDANDI FRÁ 19. JANUAR 2005

TÆR RØTTU BRILLURNAR TIL RÆTTA PRÍSIN

Fa. MAGNUSSEN
UR OG OPTIK · GULL OG SILVUR · FO-900 VÁGUR · TEL 37 32 32 · FAX 37 33 16